

# NASA skal finna olju fyri Statoil

Oljan.fo
**Jan Müller**

07.12.2013 - 14:53

Norska oljufelagið Statoil hevur gjørt sáttmála við amerikanska rúmdarfelagsskapin, NASA, sum skal lata tøkni til at leiting og útvinnan av olju og gassi.

Brúk er fyri at hugsa nýtt og venda tingunum á høvdið. Soleiðis siga tey hjá Statoil, eftir at felagið herfyri gjørdi eina avtalu við NASA um samstarv.

Avtalan merkir, at Statoil og NASA fram til 2018 í felag skulu menna loysnir, sum kunnu hjálpa norðmonnum at leita eftir olju og gassi skriva norskir miðlar.

Leitingin eftir olju og gassi er vorðin so tøkniliga framkomin seinastu tíggju árini, at tað nú er tørvur á nýggju loysnum og hugskotum," sigur Lars Høier, ein av oddamonnunum í menningardeildini hjá Statoil í einum tíðindaskrivi.

Granskingin er ætlað at fara fram á Jet Propulsion Laboratory (JPL) í Pasadena í California í USA, sum verður stýrt av tí víðagitna California Institute of Technology, sum eisini er partur av avtaluni.

"Fyri Statoil er stórur møguleiki at taka í brúk tøkni, sum er ment av NASA og JPL til avbjóðandi umhvørvi í rúmdini og brúka hesa í eins krevjandi umhvørvi í sambandi við olju- og gassframleiðslu," sigur Lars Høier,sum leggur dent á, at tey bæði umhvørvini hava nógv meira til felags, enn tey flestu duga at ímynda sær.

Partarnir fara at hyggja at menningarøkjum innan fyri m.a. superteldum, ráevnum og robottum, verður sagt í skrivinum.

Statoil brúkar árliga 550 mió. dollarar uppá menning.